## DAGSINS MEINING

# Tobbi og Heðin kunnu avgera valið

Tveir persónar kunnu avgera fólkatingsvalið - Torbjørn Jacobsen og Heðin Mortensen. Hetta verður sjálvandi sagt í víðastu merking. Kanska ávirkar tað eisini, at Lisbeth Petersen ikki stillar upp. Og verður munurin lítil millum tveir flokkar, sum liggja stavn, kunnu onnur valevni, ella ikki-valevni, avgera valið. Líkamikið, hvønn týdning vit annars leggja í eitt fólkatingsval.

Tey flestu munnu geva formanninum í Tjóðveldisflokkinum rætt, tá hann týsdagin viðmerkti, at valið kom ov tíðliga. Ósemjan í Tjóðveldisflokkinum er hvørki loyst ella hevur lagt seg. Tingbólkurin og eykaflokstingið hava talað og eftir teimum niðurstøðunum, skal Torbjørn Jacobsen útihýsast, sum tað verður sagt so diplomatiskt. Men dómurin er ikki framdur í verki - Torbjørn ber framvegis høvdið.

Torbjørn verður tikin fram, tí hann er í eini lyklastøðu við atliti til fólkatingsvalið. Hann fekk 870 persónligar atkvøður, og stillar Tjóðveldisflokkurin hann ikki á listan, missir flokkurin í hvussu er nakað av hesum atkvøðunum. Í Suðuroy fekk Torbjørn nógvar atkvøður, tí hann hevði lagt Heilsuskúlan í Suðuroy, og hesar takkar-atkvøðurnar vóru neyvan tjóðveldisatkvøður.

Samanbera vit Tjóðveldisflokkin við Javnaðarflokk-in, vóru bara 400 atkvøður á muni. Tjóðveldisflokkurin skal missa 200 atkvøður og tað kann lættliga henda, tí ein ósemja skapar ikki trúvirði. Javnaðarflokkurin skal afturímóti hava 200 atkvøður atkvøður afturat og tað kann hann lættliga fáa. Partvíst tí at flokkurin er komin í landsstýrið, hevur løgmann, sum higartil hevur klárað seg væl, og partvíst tí at flokkurin hevur fingið tveir royndar og vældámdar politikkarar í Suðurstreymoy afturat. Hugsað verður um Helenu Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýris- og løgtingslim, og Heðin Mortensen, borgarstjóra.

Á seinasta fólkatingsvali kláraði Javnaðarflokkurin seg ikki væl í høvuðsstaðnum. Stillar hann upp við sterkastu manning, er einki at ivast í, at í høvuðsstaðarøkinum kann flokkurin fáa nakrar hundrað atkvøður afturat. Harafturat kemur, at næsti maður ella næsta kvinna helst kemur úr hesum valdøminum, um vit rokna við, at floksformaðurin, Jóannes Eidesgaard, fær flestar atkvøður. At Lisbeth Petersen ikki stillar upp, kann gera, at atkvøður frá nøkrum kvinnum fella til eina sterka javnaðarkvinnu í staðin.

Sambandsflokkurin var størstur á valinum í 2001. Ringt er at meta, um formansskiftið hevur nakran týdning, men mótmælisatkvøður ímóti fullveldislandsstýrinum skuldi natúrliga fallið burtur. So er spurningurin, um hesar og persónligar atkvøður fyri Lisbeth Petersen gera, at Sambandsflokkurin fellur niður í millum. Men kanska Edmund Joensen kann gera eitt comeback! Hvar Fólkaflokkurin liggur, er ringt at siga, men bara eitt mál at vinna fólkatingssessin kann geva fólkafloksfólki viljan til at reka hart 8. februar. Tí í síðsta enda, kann raksturin avgera valið, so ópolitiskt tað annars er. Og stillar fyrrverandi løgmaður upp kann tað eisini fáa stóran týdning fyri flokkin, tá hugsað verður um møguligan samhuga hann kann fáa eftir viðferðina hann fekk á sinni. So hvør veit, kanska enda fólkatingssessirnir aftur hjá Javnaðarflokki og Fólkaflokki.

Men neyvan er nakar ivi um, at Tjóðveldisflokkurin vil gera ALT fyri at vinna sessin aftur. Um so ein semja skal til við Tórbjørn Jacobsen. Ella kanska er tað júst eitt val nú sum kann tvinga partarnar saman aftur. Og kanska hóvar tað øllum best tá avtornar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ríkisfelagsskapurin er verdur at berjast fyri

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*

Nú stendur aftur eitt fólkatingsval fyri durum og Føroya fólk skal aftur velja síni tvey umboð í Fólkatingið.

Eg havi mangan spurt meg sjálvan - er tað veruliga so galið við okkara ríkisfelagskapi sum loysingarmennirnir vilja gera tað til ??

Niðurstøðan hjá mær er, at hesin felagskapur slettis ikki er so ringur, sum hann verður gjørdur til, men hevur nógv fleiri positivar enn negativar síður tá gjørt verður upp.

Eitthvørt hjúnalag hevur ósemjur, og soleiðis er eisini við hesum hjúnalagnum, men trupuleikarnir eru til at loysað við skilagóðum dialogi partanna millum

Vit hava jú nærum allar teir fyrimunir, sum hugsast kunnu.

Vit eru partur av eitt av heimsins mest demokratisku ríkjum.

Vit hava alt tað, eitt hvørt nýmótans, framkomið samfelag hevur, umframt alt tað, nógv onnur kundu hugsað sær.

Eg loyvið mær her at



endurgeva nøkur punktir, sum eg áður havi víst á, so ung sum gomul veruliga kunnu síggja, hvussu nógv vit sjálvir í veruleikanum dagliga umsita og avgera:

- Vit hava okkara egna lóggevandi vald (Løgtingið)
- Vit hava okkara egnu stjórn (Landsstýrið)
- Vit hava okkara egna stjórnarleiðara (Løgmann)
- Vit hava okkara egna mál (Føroyskt)
- Vit hava okkara egna flagg (Merkið)
- Vit skipa okkara egna lógarpolitikk
- Vit skipa okkara egna vinnupolitikk
- Vit skipa okkara egna umhvørvispolitikk
- Vit skipa okkara egna mentunarpolitikk
- Vit skipa okkara egna almennapolitikk
- Vit skipa okkara egna útbúgvingarpolitikk
- Vit ráða yvir øllum tilfeingi í havinum uttan um okkum
- Vit ráða sjálvir fyri hvussu hetta tilfeingið verður gagnnýtt
- Vit ráða sjálvir yvir øllum inntøkum
- Vit skipa sjálvir fyri eftirliti og trygd
- Vit samráðast við onnur lond um loyvi til at gagnnýta part av teirra tilfeingi
- Vit samráðast við onnur lond um marknaásetingar
- Vit samráðast við onnur lond um handilsavtalur
- Vit ráða yvir øllum tilfeingi í undirgrundini
- Vit lóggeva um ræðisrættindini av tilfeingi í undirgrundini
- Vit gera avtalur um gagnnýtslu av tilfeinginum í undirgrundini
- Vit skipa sjálvir øll umhvørvis- og trygdarkrøv
- Vit ráða sjálvir yvir møguligum oljuinntøkum
- Vit eru longu í neyvum samstarvi við annað land (Danmark)
- Vit avgera sjálvi í hvønn mun hetta samstarv virkar - og gagnar okkara borgarum
- Vit kunnu til eina og hvørja tíð gerast ES borgarar, uttan at vera limir .
- Vit kunnu til eina og hvørja tí og á einum og hvørjum stað kalla okkum Føroyingar
- Vit eru málsliga betri fyri enn flestu fólk í heiminum.

Okkara lesandi sum byrja lesnað í Danmark kunnu við donskum ríkisborgararætti, útbúgva seg hvar tey vilja í Evropa og arðastaðni á líka fóti við onnur ungfólk í ríkinum og við donskum SU og SU lánum.

Vit hava øll tey somu rættindi og somu skyldur sum aðrir borgarar í ríkinum.

Minnilutakenslur kunnu vit ikki brúka til nakað, men gott samstarv í ríkisfelagsskapinum og viljin til áhaldandi at menna Føroya land og tað fólk her býr er gull vert.

**Sambandsflokkurin - einasti føroyski flokkur sum veruliga vil ríkisfelagsskap**, vil áhaldandi verja og tryggja hesi rættindi og vælferðarsamfelagið innan fyri ríkisfelagsskapin.

# Ósømiligur frekleiki

**Finnur Helmsdal**

Varð boðin til fundar á Parnassinum mánamorgunin. Tað var Innlendismálaráðið, sum bjóðaði tingmonnum og øðrum at hoyra ein varastjóra í Udlændingestyrelsen greiða frá løgfrøðini og øðrum útlendingum viðvíkjandi.

Skal ikki nágreina tað, varastjórin segði, men bert vísa mína støðugt vaksandi ónøgd við leiklut hennara á fundinum. Lat meg siga tað soleiðis, at eg havi ongan tíð hoyrt ein einasta embætismann í almennum fyrilestri politiserað evnið, sum hesin varastjóriun gjørdi. Veit ikki, um tað var medvitað, men kvinnan vísti beinleiðis vanvirðing fyri fundarfólkinum og øllum arbeiði, sum verður gjørt við atliti at útlendingamálum, sum kunnu tengjast at Føroyum. Nei, hon kundi eins væl verið framsøgufólk hjá Vinstra í úlendingamálum.

Nú tók umboð fyri fútan orðið viðhvørt. Haldi hon



var sera greið og skilagóð. Men tá hon nýtti høvi sum løgfrøðingur at fortelja okkum politikarum, at vit skulu duga at skyna í millum av og á, tá kundi hon samstundis havt sent fyrilestrahaldaranum somu heilsan. Sjálvandi skulu vit politikarar duga at skyna í millum løgfrøði og kenslur, men ein toppløgfrøðingur, sum starvast við so týdningarmiklum viðurskiftum sum útlendingamálum, skal sanniliga eisini duga at skyna ímillum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.